**AVRIT**

UPPSKOT TIL VIÐTØKUR FYRI
KOLLAFJARÐAR BYGDARSAVN

Grein 1

Kollafjarðar Fornminnisfelag og Kollafjarðar bygdarráð seta á stovn sjálvognarstovnin **KOLLAFJARÐAR BYGDARSAVN.**

Grein 2

Endamál savnsins er innan Kollafjarðar kommunu

at savna, skráseta, varðveita og sýna fram gripir, sum hava søguligt virði og savna frásagnir um nýtslu og søgu teirra.

at varðveita og umsita ávís føst fornminni og forngripir.

at savna og varðveita skjøl, myndir, ljóð - og myndabond av bygdasøguligum týdningi.

at seta upp siðsøguliga framsýning.

Grein 3

Savnið verður stýrt av fimm - mannavevnd, har tríggir limir verða valdir av Kollafjarðar fornminnisfelag og tveir limir av Kolla - fjarðar bygdarráð. Nevndin skipar seg sjálv. Nevndin stendur aðalfundi Kollafjarðar fornminnisfelags og Kollafjarðar bygdarráði til svars fyri ognum og rakstri savnsins.

Grein 4

Gevst savnið við virki sínum, verður farið fram eftir grein 3, stk. 3 í løgtingslóg nr. 17 av 9. mai 1972 við seinni broytingum av 17. juli 1986 um bygdasøvn við mentunarligum virksemi.

Soleiðis samtykt á eykaaðalfundi Kollafjarðar fornminnisfelags tann 17. febr. 1992 Tryggvi Samuelsen

og á fundi á Kollafjarðar bygdarráð tann 11. juni 1991

KOLLAFJARÐAR
KOMMUNA
FR-410 KOLLAFJØRÐUR

Joensen

Góðkendar.

FØROYA LANDSSTYRI, 15. november 1993

landsstýrismaður